Útger›arvirksemi í útja›ara

ÚTGER‹AHAVN
Jan Müller

Henrik Old, tingma›ur ger vart vi› útja›aragrein

Fá mál hava fingi› so nógva umrø›a og áhugin og spenningurin hevur neyvan veri› so stórur um eitt ávíst mál sum um, hvar í Føroyum oljuútger›arhavnin skal liggja. Nú nærkast tí›ini, at henda avger› skal takast og tí hevur Henrik Old, tingma›ur sett landsst‡rismanninum í oljumálum skrivligan fyrispurning. Hann spyr, hvørji stig landsst‡risma›urin hevur tiki› fyri at tryggja sær, at grein 3, stk 2. í løgtingslóg nr. 5 frá 8. februar 2000 um fyrsta útbjó›ingarumfar til leiting eftir og framlei›slu av kolvetni ver›ur fylgt? Í vi›merkingunum vísir Henrik Old á umrøddu grein, sum sigur, at "tá landsst‡risma›urin veitir loyvi, skal hann leggja dent á, at leitingar- og framlei›sluvirksemi úr Føroyum, eisini fer fram í útja›aranum." Henrik Old sigur, at nú er helst sí›sta útkall, um hetta skal gerast veruleiki, tí nú eru oljufeløgini í holt vi› at innheinta tilbo› uppá útger›arst›ir, og sum skilst, er ætlanin hjá oljufeløgunum at ganga saman um eina útger›arst›. Ta› var annars Javna›arflokkurin, sum skjeyt upp, at leitingar- og framlei›sluvirksemi úr Føroyum, herundir m.a. vi› útger›arst›um, skal ganga úr Su›uroy. Ta› uppskoti› bleiv ikki samtykt, men afturfyri ein linari or›ing.

Útja›arin skal vera vi›

OLJUÚTGER‹ARHAVN
Jan Müller

Oljufeløgini, sum hava fingi› loyvi at leita eftir olju á landgrunninum, hava fleiri fer›ir fingi› greitt at vita frá Oljumálast‡rinum og landsst‡rismanninum í oljumálum, at útbjó›ingarlógin krevur, at virksemi í sambandi vi› leiting og framlei›slu, eisini fer fram í útja›aranum. Hetta sigur Ey›un Elttør, landsst‡risma›ur vi› Sosialin. Hann undirstrikar, at fyri at eingin ivi skal vera um hetta máli›, er Oljumálast‡ri› í løtuni í fer› vi› at senda øllum loyvishavarunum bræv, har ta› ver›ur víst á umrøddu grein í útbjó›ingarlógini. - Hetta gera vit fyri at eingin misskiljing skal vera. Tann politiski viljin er, at útja›arin ver›ur tikin vi›, og hetta hava feløgini fingi› at vita sigur Ey›un Elttør. Hann vísir á, at hetta er ikki naka›, sum kemur knappliga fram ella sum nú kemur sum naka› yvirraskilsi.

– Fær Ey›un Elttør ikki ein stóran trupulleika, um oljufeløgini velja at brúka eina havn í mi›sta›arøkinum til alt sítt útger›arvirksemi?

– Eg havi ongan trupulleika. Tá hava oljufeløgini ein trupulleika. Ta› er álagt mær vi› lóg, at virksemi skal eisini vera í útja›aranum.

– So tey fáa máli› aftur í høvdi›?

– Ta› fáa tey, tí tey mugu lúka nakrar treytir.

– Men setir tú teg í teirra sta›, hvussu sær tú, at tey kunnu hava útger›arhavnina í mi›ste›arøkinum og leggja ein part av virkseminum í útja›aranum?

– Lat okkum nú fáa at síggja, hvat feløgini koma vi›. Men eg ivist onga løtu í, at feløgini koma vi› einum konsepti, har útja›arin er tikin vi›, tí hetta er ta›, sum teimum er álagt.

– Hví brúka or›i› útja›arin? Hví ikki kalla ein spaka fyri ein skapa og siga, at vit her tosa um Su›uroynna?

– Hatta seg›i tú!

– Men hev›i ta› ikki veri› lættari hjá landsst‡risma›nninum, um tilbo›i› at leggja útger›arhavn í Su›uroy var ta› besta, tí tá slapst tú undan eini millumloysn?



Ey›un Elttør, landsst‡risma›ur: Oljufeløgini hava fingi› grei› bo›

Til ta› sigur Ey›un Elttør, at um slíkt uppskot veruliga var ta› besta og ta› var› lagt fyri seg, so hev›i hann sjálvandi gó›tiki› ta›. Hann dugir heldur ikki at síggja naka› gali› í, at virksemi› endar í Su›uroynni og vil enn einafer› sláa fast, at hann alla tí›ina hevur fylgt lógini og ikki hevur krógva› naka›. Bræv›i›, sum nú fer út til feløgini, er eitt prógv um ta› sama. Tí har fáa feløgini enn einafer› at vita, hvat útbjó›ingarlógin sigur.

Teir bara grugga tyrlumáli›

Landsst‡rsima›urin vi› fiskivinnumálum, Jørgen Niclasen, er ikki nøgdur vi›, at formenninir í andstøuflokkunum hava seinka› málinum um tyrluflúgvingina vi› at fáa ta› beint aftur í nevnd

TYRLUFLÚGVING
Edvard Joensen

Edmund Joensen og Jóannes Eidesgaard hava bara grugga› máli› um tyrluflúgvingina, heldur Jørgen Niclasen, landsst‡risma›ur, sum leg›i máli› fyri Tingi› annan november.

Hann sigur, at her er gjørt eitt rættiliga stórt forarbei›i. Eitt ta› besta, nakrantí› er gjørt yvirhøvur, sigur hann. Og vi› at beina máli› aftur í nevnd, er tvey ára arbei›i bara seinka› óney›ugt, sigur Jørgen Niclasen, landsst‡risma›ur.

Hann vísir aftur, at talan í veruleikanum bara er um ein fjaldan stu›ul til Atlantsflog. Her ver›ur spælt vi› púra opnum kortum, vísir landsst‡risma›urin á.

Jørgen Niclasen metir ikki, at ta› er naka› skeivt í, at tyrlutænastan ikki er bo›in alment út. Hann er ikki í iva um, sigur hann, at hendan loysnin, sum vald er, er tann bíligasta, sum fáast kann.

Ta› er rættiliga sannlíkt, at ein útbjó›ing heldur hev›i d‡rka› ætlanina munandi, enn at gjørt hana bíligari, sigur Jørgen Niclasen.

Discount loysn

Hendan ætlanin, sum nú liggur fyri, er ein rættiliga skræva› loysn, sigur Jørgen Niclasen. Her er bara ta› mest ney›turviliga tiki› vi›, og einki er til avlops til Atlantsflog, metir hann.

Hann vísir á, at játtanin er 14 milliónir krónur árliga. Tyrlan kostar 6,6 milliónir dollarar at keypa, og bara kapitalkostna›ur og trygging av hesum fara upp um tær níggju milliónirnar árliga, sigur Jørgen Niclasen.

So kemur raksturin. Og hann er ikki bara brenni og vi›líkahald. Hann umfatar eisini 24 íma vakt, umframt at felagi› alla tí›ina skal syrgja fyri at venja manningina, so hon til einahvørja tí› klárar øll krøv, i› sett ver›a. Eitt nú er krav um simulatorvenjing ein treyt, lúkast skal.

Jørgen Niclasen avvísir púra, at hetta tyrlukeypi› bara er ein máti hjá Atlantsflog at fáa sær til vega n‡ggja tyrlu, fyri ta gomlu, sum skjótt hevur tænt s‡na herskyldu og tí skal skiftast út.

Hóast hendan n‡ggja tyrlan skal røkja nakrar av somu uppgávum, sum tann gamla hevur, hava tær sum so einki hvør vi› a›r at gera, sigur hann.

Ta› er rætt, at hendan n‡ggja tyrlan eisini skal brúkast til rutuflúgving innanoyggja. Men a›rar uppgávur so sum flutning fyri eitt nú SEV ella alistø›irnar, fer tann gamla tyrlan framvegis at gera, sigur landsst‡risma›urin.

Ney›ugt vi› tveimum tyrlum

Hann leggur dent á, at ney›ugt er alla tí›ina at hava tvær tyrlur, um vit skulu hava eina vaktarskipan, vit kunnu líta á. Og hann tekur uppaftur ta›, hann seg›i vi› Sosialin leygardagin, at hann metir ikki donsku sjóverjutyrluna vera nóg gó›a trygd fyri, at vit altí› hava eina vælvirkandi bjargingartænastu í luftini.

– Vit hava enn ongantí› uppliva› hesi árini, danska tyrlan hevur veri› her, at hon hevur veri› til taks eitt helt ár í senn uttan slit, sigur Jørgen Niclasen.

Í sambandi vali› av tyrlu hevur veri› f‡lst á, millum anna› í álitinum frá Vinnunevndini, at hon er ov lítil, um ein størri skipsvanlukka hendir. Til dømis klárar hon ikki at taka alla manningina av einum línuskipi upp í senn, ver›ur víst á. Hon er ætla› til 13 fólk, me›an línuskipini vanliga hava 14 mans umbor›.

Men ta› heldur Jørgen Niclasen ikki vera heilt rætt. Hann sigur seg hava fingi› at vita frá tyrluskipara hjá Atlantsflog, at í eini ney›stø›u høvdu teir kortini tiki› meir, enn tyrlan er sett til at taka.

At fört ver›ur fram, at ta› ikki er rætta tyrlan, vald er, skilir Jørgen Niclasen ikki. Hann sigur, at fólk frá eitt nú Vaktar- & Bjargingartænastuni og Almanna- og Heilsumálast‡rinum hava veri› og kanna›, hvør tyrla best er egna›, og eru komin til ta ni›urstø›u, at Bell tyrlan, sum Atlantsflog nú ætlar at keypa, er tann, sum best er egna› til okkara tørv.

Hann vísir aftur, at nøkur tyrla longu er keypt, men váttar, at samrá›ingar hava veri›, og avgjørt er, hvat slag av tyrlu, keypast skal.

Poul Nyrup Rasmussen:

Føroyar ver›a verandi í ríkinum

Danskir og Føroyskir embætismenn skulu nú í holt vi› samrá›ingar um eina loysn á sjálvst‡risspurningin um, sum liggur innan fyri ríkisfelagsskapin. Hetta kunna›i danski forsætisrá›harrin um á fundi í 21 mannanevndini í gjár

SJÁLVST†RISÆTLANIN
John Johannessen

Poul Nyrup Rasmussen sta›festir í brævi til Annfinn Kallsberg, at samrá›ingarnar, nú ver›ur fari› undir, ikki snúgva seg um fullveldi, men at broyta heimast‡rislógina

Danski forsætisrá›harrin er til rei›ar at lata embætisfólk síni fara í samrá›ingar vi› embætisfólkini hjá løgmanni um at broyta heimast‡rislógina.

Hetta ger Poul Nyrup Rasmussen greitt í einum brævi, sum hann hósdagin sendi løgmanni, og sum Sosialurin hevur fingi› innlit í.

Í brævinum vísir danski forsætisrá›harrin til óformella fundin, sum hann og løgma›ur høvdu í Reykjavík tann 5. november í ár. Á hesum fundinum skal Anfinn Kallsberg hava skoti› upp, at partarnir fara undir samrá›ingar um at broyta heimast‡rislógina, solei›is at ta› innan fyri rammur ríkisfelagsskapsins skal skapast eitt brei›ari grundarlag fyri at taka yvir fleiri málsøki.

Somulei›is vísir danski forsætisrá›harrin á, at møguleiki er fyri at gera eina ví›ka›a heimast‡rislóg vi› at fremja nakrar broytingar í verandi heimast‡rislóg. Hendan møguleikan skal landsst‡ri› sambært danska forsætisrá›harranum eisini hava nevnt fyri donsku stjórnini.

Einki fullveldi

Poul Nyrup Rasmussen kunna›i limirnar í serligu 21 mannanevndini, sum fylgir gongdini í sjálvst‡rismálinum, um hetta brævi› á fundinum, sum var› hildin á Christiansborg fríggjamorgunin.

Sosialurin hevur tosa› vi› Piu Larsen, sum var vi› á fundinum, og sum vi› einum skrivligum fyrispurningi til forsætisrá›harran um gongdina í málinum var orsøkin til fundin.

Pia Larsen sta›festir, at danski forsætisrá›harrin vísti á, at talan ver›ur um samrá›ingar um eina loysn, sum liggur innan fyri ríkisfelagsskapin. Eisini sta›festir hon, at Poul Nyrup Rasmussen seg›i, at løgma›ur hevur heitt á seg um at fara undir samrá›ingar um at broyta heimast‡rislógina.

Í brævinum til løgmann ger Poul Nyrup Rasmussen púra greitt, at talan ikki ver›ur um samrá›ingar um fullveldi.

Danski forsætisrá›harrin vísir á, at samrá›ingarnar ikki kunnu fatast sum nøkur broyting í rættarligu stø›u Føroya.

Poul Nyrup Rasmussen skrivar millum anna› solei›is í brævinum til Anfinn Kallsberg: »Færøernes statsretlige og folkeretlige status vil med andre ord være uændret, dvs. som vi kender dem i dag. Hvis den færøske befolkning på et tidspunkt i fremtiden træffer beslutning om at træde ud af riget, vil det således efter grundloven være nødvendigt med et samtykke fra regeringen og Folketinget på dette tidspunkt. Den ændring af hjemmestyreordningen, som der nu indledes forhandlinger om, vil naturligvis ikke kunne ændre herpå«

Sostatt ger danski forsætisrá›harrin púra greitt, at samrá›ingarnar, sum partarnir nú fara undir, einki hava vi› Føroyskt fullveldi at gera.

Fullveldi enn máli›

Ta› hevur ikki eydnast Sosialinum at fáa vi›merkingar frá løgmanni til brævi› frá danska forsætisrá›harranum. Men Høgni Hoydal, varaløgma›ur og landsst‡risma›ur í sjálvst‡rismálum, sta›festir, at landsst‡ri› framvegis arbei›ir fram ímóti fullveldinum.

– Landsst‡ri› arbei›ir vi› at avrigga heimast‡rislógina, solei›is at vit innan fyri eitt ávíst áramál hava yvirtiki› øll málsøki og kunnu atkvø›a um at seta í gildi eina føroyska grundlóg fyri Føroyar, sigur Høgni Hoydal.

København, 14 DEC. 2000

Lagmand Anfinn Kallsberg
Finanes
Postboks 64
FO - 110 Tórshavn

Kære Anfinn Kallsberg,

På vort møde den 5. november 2000 foreslog du, at der nu indledes forhandlinger om en ændring af hjemmestyreloven, således at der inden for rigsfællesskabets rammer skabes et bredere grundlag for hjemmestyrets adgang til at overtage yderligere sagsområder. Du foreslog samtidig, at forhandlingerne i en første fase føres på embedsmandsniveau.

Regeringen har tidligere givet udtryk for, at der – hvis Færøerne selv måtte ønske det – er gode store og konstruktive muligheder for at udvide og forme det færøske hjemmestyre på en ny og anderledes måde inden for rammerne af rigsfællesskabet.

Regeringen har således ved flere lejligheder – også i Folketinget den 6. april 2000 peget på, at vi også er rede til at forhandle en helt ny selvstyrelov, der vil indebære, at det færøske folk inden for rigsfællesskabets rammer kan overtage yderligere sagsområder med henblik på selvstyre og selvbestemmelse i egne anliggender.

Størstur í síni stødd – við størsta dieselmotori – til besta prísin
Størstur í síni stødd – við størsta dieselmotori – til besta prísin
ROYN HENDAN SERA VÆLUMTØKTA BILIN
KIA
CARNIVAL
2.9 Dohc Turbo-Diesel
16 V, 126 HK, 5 hurðar
Familju - camping - firmabilur- og "mini-bussur"
Fæst eisini sum vøruvognur
EINANS 198.800,-

Multibilurin til einhvørja loysn
Dupult airbag, ABS, servostýring, sentrallás, startsperra, elrútar í framhurðunum, el-hitað og -stýrd síðuspegl, miðsetur, sum kunnu vendast og flytast aftur og fram við borðum, koyrisetrið kann setast í ð ymiskar støður, rattið kann flytast upp og niður, nakkastuðlar, sum kunnu stillast og takast burtur, lesiljós framman, kúfangarar í sama liti sum bilurin, skinnarar á takinum v.m.
3 ára garanti/100.000 km. garanti
EINANS 236.800,-

Rætti bilurin til mong endamál. –Pláss fyri 7 fólkum og hópin av viðføri. Fæst eisini við aut. gearum.
D. B. Bilar
J. Broncksgøta 15 • FO-110 Tórshavn
Tlf. 310600